Ársins besta veitsla

JAVNI

Orð og myndir: Rúna Sivertsen

Seinasta leygarkvøld var ársveitslan hjá Javna á Hotel Føroyum. Hevur tú einaferð verið á veitslu hjá Javna, so leingist tær altíð aftur. Tey menningartarnaðu duga at hugna sær, so tað forslær. Teirra lívsgleði smittar illa, so øll, bæði stór og smá gerast ovurkát

Tað sær út til, at Malena Arnholdsdóttir hevur "gott tak" á almannastjóranum, Petru Joensen. Malena kann sagtans flenna, tí fyrsta veitslan við henni sum formanni eydnaðist framúr væl. Aftanfyri, 18 ára gamli sonurin, Ólavur, sum er menningartarnaður

Beinta Haraldsen var gestarøðari. Hon hugleiddi um, hvussu tað er at eiga menningartarnað systkin

Anthon er komin heilt úr Klaksvík. Hann er hálvur breti og býr nú á Sambýlinum á Mýruvegi

Jørgen á Vollanum var ein av mongu gestunum. Hann er ein av teimum hepnu, sum hevur fingið egna íbúð á Bóndaheygi 15. Har eru 5 vardar íbúðir

Tey mennigartarnaðu krógva ikki kenslur sínar - og er onkur keddur, er altíð eitt troystandi hjarta í nánd. Beinta er av Viðareiði og John úr Skúgvi

Millum røðararnar var eisini Øssur Gudmundarsson. Hann takkaði øllum so hjartaliga fyri alt

Landskenda orkestrið, "M'as Blues Band" spældi til dans. Dansurin er hæddarpunktið á veitsluni hjá Javna

Óli Wolles riggaði væl sum "baby". Hann skuldi eta jogurt, men hendurnar vóru ikki hansara egnu, so har varð eitt øgiligt svans



Harmoniku rnar settu rættiligt lív á veitsluna. (F. v.) Harald Haraldsen, John Midjord og Niels Heðin Joensen

Koyristólur er eingin forðing á veitslunum hjá Javna. Her svinga Marianna og John við Margit

"Mítt hjarta pumpar fyri tær" Við borðini svingaðu bæði stór og smá til sangirnar

Jastrid í himmiríki; hon fekk eitt fast klemm frá Tórur, sum var í røttum veitsluhýri

Diana og Finn í Puntabyrgi. Í mong ár hava tey staðið á odda, tá veitslurnar hjá Javna skuldu leggjast til rættis. Diana hevði eisini ein fingur við í spælinum hesaferð. Bert fáar dagar aftrat verður tað Dianusa rødd í hinum endanum, tá tú ringir til Javna. Malena hevur nú fingið farloyvi upp á pláss, so hon kann taka sær av formanstarvinum

"Eisini, eisini tá, veit eg at lívið er gáva, eitt dýpi av dýrari tíð, sum øll skulu valla ígjøgnum, rekast og villast inní", sang Arnvør á Torkilsheyggi við serstakliga vøkru rødd síni

John kundi rættiliga slappa av, tí í hesum selskapinum var avgjørt eingin politisk gøla at hóma

Anna á Dul Mørkøre og maðurin Bjarti. Komandi dagarnar fáa tey úr at gera við at fyrireika leguna fyri tey menningartarnaðu , sum verður á Zarepta dýrahiðjudagshalguna

HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo

Leygardagin 03.05. kl. 20[45]
Leygardagin 03.05. kl. 23[30]
Sunnudagin 04.05. kl. 20[00]
Sunnudagin 04.05. kl. 22[45]

Leygardagin 03.05. kl. 21[00]
Sunnudagin 04.05. kl. 20[45]

Leygardagin 03.05. kl. 18[45]
Sunnudagin 04.05. kl. 18[00]

Leygardagin 03.05. kl. 19[00]
Sunnudagin 04.05. kl. 18[45]

Leygardagin 03.05. kl. 23[15]
Sunnudagin 04.05. kl. 23[00]

KOMANDI FILMUR

Frumsýning Fríggjadagin 09.05.

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu